# Skúlastýrisfundur nr 2 2025

Stað: Skúlin á Argjahamri - Stórastova

Dato: 04.03.2025

Møtt á fundi:

Ása Chirstiansen, skúlastýrisforkvinna

Guðrun Kerá, foreldraumboð

Paula Neshamar Thomassen, foreldraumboð

Anita á Fríðriksmørk, kommunustýrisumboð

Høgni Vilhelmsen, kommunustýrisumboð

Louisa Niclasen, læraraumboð

Marin S. Bláberg, skrivari

Mál á skrá:

| | |
|---|---|
| Fartelefonir | Mælt verður til at seta telefonforboð í verk komandi skúlaár.<br>Skúlastýrið ynskir at hoyra foreldraumboðini í málinum.<br>Avtalað varð, at skúlin boðar foreldraumboðunum frá fundinum.<br><br>2. september verður felags foreldrafundur, har skúlastýrið leggur sínar ætlanir viðvíkjandi fartelefonum fram. |
| Bussleið millum skúla og AB vøll | Skrivarin skal senda skriv til kommununa viðvíkjandi bussleiðini millum skúla og AB vøllin.<br>Skúlastýrið metir, at ítróttur er stórur partur av trivnaðinum hjá børnunum. Tí hevur tað týdning, at betra um busssambandi. Ynski er, at bussurin koyrir millum skúla og AB vøll kl. 14.30-16.30 vanligar gerandisdagar |

| | |
|---|---|
| Komandi 1. flokkur | Nú nýggja reglugerðin um næmingatal í hvørjum flokki er sett til 22 næmingar, er ikki pláss fyri øllum argjabørnum.<br>4 næmingar fáa tí ikki pláss á Argjahamri og mugu inn í býin at ganga í skúla. Skúlastýrið ynskir at senda eina áheitan til BUMR og Tórshavnar kommunu um, at børnini úti á Argjum mugu sleppa at ganga í skúla á Argjahamri.<br><br>Skúlastýrið metir, at tað er ov langt hjá 7 ára gomlum børnum at fara inn í býin. Harumframt verða tey heldur ikki partur av barnalívinum á sama hátt sum hini børnini á Argjum. |
| Tímabýtið komandi skúlaár | Skúlaleiðslan ynskir at stytta skúladagin, serliga hjá hádeild. Skúlastjórin legði ætlanirnar fram fyri skúlastýrið. Skúlastýrið bleiv eisini kunnað um, at skúlin ætlar at fara undir eina E-Sport breyt.<br><br>Skúlastýrið tekur undir við, at skúlaleiðslan biður BUMR um loyvi, at lækka tímatalið hjá eldru næmingunum. |
| Bussskýlið | Skúlastýrið ynskir at taka upp arbeiðið aftur at flyta bussstøðgistaðið hjá bussinum yvir um vegin. Orsøkin til tess er, at skúlastýrið ynskir ikki, at børnini skulu yvir um vegin fyri at fara í bussin. Eina foreldraumboðið kunnaðið stýrið um, at eigarafelagið er við uppá at flyta skýlið.<br>Avgjørt varð, at skrivarin skal senda bræv til TK um málið. |
| Vindfang til høvuðsdyrnar | Skúlastýrið ynskir at fáa eitt vindfang fyri høvuðsdyrnar. Nógvur vindur liggur ofta inn móti høvuðshurðini. Tað kann gerast vandamikið, tí trykkið er so høgt. Skúlastýrið mælir til, at skúlastjórin arbeiðir víðari við málinum við at fáa vindfang fyri høvuðsdyrnar. |

Fundartíð: 16.00-19-00